TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Leiðari til útibarnagarð

Í sambandi við at útibarnagarðurin í Havnardali og í Skótahúsinum verða lagdir saman í vár, søkir Tórshavnar kommuna við hesum eftir leiðara.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum grannalagi, har náttúran hevur stóran týdning í dagliga arbeiðinum.

40 børn í aldrinum 5-7 ár búleikast í Havnardali og við Havnar á.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin
- er útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir (er fyrimunir)
- kann arbeiða sjálvstøðugt, og taka avgerðir
- hevur hugsjónir, tá ið tað snýr seg um virksemið í einum útibarnagarði
- saman við starvsfólkunum er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag merktan av virðing fyri, foreldrum og starvsfeløgum
- dámar at vera úti saman við børnunum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett tann 15. apríl 2001. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Katrin Petersen, samskipara, tlf. 315160.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 05. mars 2001.

SNARSKIVAN

## Ársaðalfundur – 2001

Boðað verður til ársaðalfundar á Parnassinum á Hotel Hafnia mikudagin 28. febr. 2001, kl. 19.30.

Fundarskráin verður eftir § 18 í felagsins lógum.

**Havnar Handverksmeistarafelag**

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Toyota Hilux 2,4 TD
**Árg.:** 18.10.2000
**KM.:** 4.952
**Eyka útgerð:** El-rútar, el-spegl, sentrallás, umdr. teljari, airbag, servostýring, 4x4, A.B.S., lyktajustering og metallakk.

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú og er at síggja á Smyrilsvegi 20, 100 Tórshavn.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Tlf. 345600 · lokal 728
Fax nr. 345607
at hitta millum kl. 13[00]–15[00]

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Honda Civic 1.5 VTEC - 4 hurðar
**Árg.:** 1996
**KM.:** 103.142
**Eyka útgerð:** El-sóltak, el-spegl, el-rútar, sentrallás, airbag, lyktaregulering, 1493 ccm 66 kw VTEC-E

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Magni Petersen, sýnsmaður
Tlf. 345728 · Fartlf. 215728
Fax nr. 345607
at hitta millum kl. 13[00]–15[00]

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

## Kunngerð um summarfrítíð 2001

Byggivinnan heldur summarfrítíð vikurnar 30, 31 og 32, tað er frá mánadegi 23. juli 2001 til leygardag 11. august 2001.

**Føroya Handverksmeistarafelag**
Vinnuhúsið
Postsmoga 1038 · 110 Tórshavn
Tlf. 311864 · Fax 317278 · e-mail: industry@industry.fo



**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*
**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*
**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*
ADC
**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**

STH h

## Skeið í Dekoratión

Skeiðið er ætlað starvsfólki í handlum, virkjum og øðrum áhugaðum.

**Innihald:**
- vøruuppsetan
- skeltiskriving
- litir
- ljós
- skitsutekning

**Dagar:** 23. febr. 16.00-20.00
24. febr. 09.00-18.00
02. mars. 16.00-20.00
03. mars 09.00-18.00
09. mars 09.00-15.00
**Stað:** Føroya Handilsskúli, Kambsdalur
**Lærari:** Benny Ejdesgaard
**Kostnaður:** Kr. 2.400,- fyri hvønn, íroknað er frálæra, tilfar og mat.
**Tilmelding:** Áðrenn 21.februar 2001

Skeiðið er treytað av nóg stórari luttøku

SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH
Marknagilsvegur 77, Postrum 177, 110 Tórshavn, Tel: 318813, Fax: 313374,
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo, Heimasíða: http://sth.olivant.fo

## Muskelterapeut

**Eri at hitta í Runavík í viku 8**

Hevur tú:
✓ Høvuðpínu
✓ Læsta øksl
✓ Músa-arm
✓ Knýttar vøddar o.a.
✓ Ynski um økta vælveru

**Hervør Jacobsen**
Læknaexam. Muskelterapeut
**Tlf. 213034**

VEGG SAGING
Hurðar, vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

GÓLV SLÍPING

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820



## PhD námsstyrkir á Náttúruvísindadeildini

Søkt verður eftir fólki til tvær PhD-verkætlanir á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Verkætlanirnar eru fíggjaðar av oljufeløgunum Statoil-bólkinum, ið er samansettur av Statoil, Phillips, Enterprise og Veba. Ein lýsing av verkætlanum er at finna niðanfyri.

Umsøkjarar til phd námsstyrkirnar skulu hava prógv sum cand. scient. (t.d. jarðalisfrøði, støddfrøði) ella sivilverkfrøðingur (t.d. ravmagn, kolvetni). Tó eru tey, ið eru ávegis at gera kandidatuppgávu, eisini vælkomin at søkja.

**Seismisk signalviðgerðar hættir og modellering av multiblum afturkastingum í basalti og legugrýti**

Føroyska jarðfrøðin er merkt av, at tjúkk basaltløg eru oman á jarðløgunum, ið kunnu innihalda olju og gass. Phd-verkætlanin skal geva betur fatan av seismiskum mátingum og av viðgerðini av seismiskum signalum, serliga við atliti at føroyska økinum. Ein týðandi partur av verkætlanini er at kanna útbreiðsluna av seismiskum aldum í lagdeildum basalti og at kanna trupulleikarnar um at fáa vitan um legugrýti undir basaltløgunum út frá seismiskum mátingum. Serligt atlit verður til »multiblar« afturkastingar av seismiskum aldum í lagdeildum basalti, og til at trýstaldur verða gjørdar um til »shear«-aldur.

Meir fæst at vita um verkætlanina við at venda sær til Magnus Danielsen, professara, á teldupostadressu magnusd@nvd.fo ella á tel. 315306 hjá Náttúruvísindadeildini.

**Mekaniskir eginleikar hjá basalti**

Tjúkku basaltløgini oman á legugrýtinum í føroyska økinum eru ein serlig avbjóðing, ikki bert tá tulkingar av seismiskum royndum skulu gerast, men eisini í samband við sjálva boringina eftir olju og gassi í undirgrundini. Í hesi verkætlanini verða gjørdar kanningar av viðurskiftum, ið hava týdning fyri hvussu skjót boringin kann vera, og av týdninginum av, at rivur eru í basaltinum. Dentur verður lagdur á at analysera mekaniskar spenningar og elastiskar eginleikar við atliti at basalti í føroyska økinum, m.a. við starvstovukanningum og modellum. Kanningar verða eisini gjørdar av anisotropi, heterogeniteti og av viðurskiftum, ið hava týdning fyri at fáa seismisk signal gjøgnum basaltið.

Meir fæst at vita um verkætlanina við at venda sær til Bernt S. Aadnøy, professara, á teldupostadressu bernt.aadnoy@tn.his.no ella á tel. + 51831700 á Høgskolen i Stavanger í Noregi.

Umsóknarfreistin fyri báðar verkætlanirnar er til 1. mars 2001. Umsóknir við prógvum, ævisøgu (curriculum vitae) og møguligum greinum skulu sendast til

**Fróðskaparsetur Føroya,**
J. C. Svabosgøta 14,

## Ogn okkara í Vági til sølu!

Um hóskandi boð fæst, er ogn okkara í Vági til sølu.

Ognin er á tveimum mtr. nr. og kann tí seljast hvør sær ella samlað.

**Tlf. 373681 - 217335**

## Toyota Landcruiser

Vøruvognur okkara er til sølu fyri hægstbjóðandi. Vit hava boð uppá kr. 128.000,00. Bilurin er vælhildin, undirvognsviðgjørdur. Lakeraður í fjør.

Nærri fæst at vita við at venda sær til okkum.

**P/F Zacharias Leitisstein**
Postboks 133 · 620 Runavík
Tlf. 448233

## Skrivstovunæmingur

Á Dómaraskrivstovuni er eitt læurpláss leyst at søkja til setan 1. mars 2001.

Umsøkjarar mugu hava staðið fráfaringarroynd fólkaskúlans, harumframt FHS-, HH-prógv ella líknandi.

Næmingurin verður settur sambært felagssáttmála millum Statsansattes kartel og Finansministeriet og sáttmála millum HK/STAT og Finansministeriet.

Lærutíðin fyri næming við FHS-prógvi er 3 ár og fyri næming við HH-prógvi 2 ár. Í lærutíðini skal næmingurin til Danmarkar á handilsskúla í 15 vikur tilsamans.

Byrjunarlønin fyri næming við 3 ára lærutíð 9.109,58 og fyri næming við 2 ára lærutíð 9.582,42.

Hondskrivað umsókn, prógv og møgulig viðmæli verða at senda Dómaraskrivstovuni í seinasta lagi 20. februar 2001.

**Sorinskrivarin (dómarin) í Føroyum**
tann 12. februar 2001

Joen H. Andreassen
adm.

## Konditara-/Bakaralærlingur

Sóknast verður eftir einum konditara- ella bakaralærlingi at byrja beinanvegin.

**Sp/f S. Dimon**
Tlf. 371080 ella 210864

Postverk Føroya

## Starv sum økisleiðari í Norðoya postøki

Søkt verður eftir økisleiðara til Norðoya Postøki skjótast til ber.

**Arbeiðsuppgávur:**
Økisleiðarin kemur at hava dagligu leiðsluna av postvirkseminum í Norðoyggjum. Starvið er fjøltáttað og mennandi. Tú kemur í samband við hópin av viðskiftarfólki.

Økisleiðarin hevur í høvuðsheitum ábyrgdina av fylgjandi:
- Postavgreiðslunum, postútberingini og postflutninginum í Norðoyggjum
- Starvsfólkaleiðslu, -trivnaði og -menning
- Roknskapi
- Hølisviðurskiftum og útbúnaði

**Faklig førleikakrøv**
Ynskiligt er, at tú hevur útbúgving innan starvsfólkaviðurskifti, bú- og roknskap, teldu, rakstur og marknað á merkonomstøði ella líknandi. Starvsroyndir eru ein fyritreyt fyri setanini. Postlig útbúgving er ein fyrimunur, men eingin treyt.

**Persónlig føleikakrøv eru**
- at hava góð samstarvsevnir
- at vera úrtøkuskapandi
- at sýna hugfangandi leiðsluhugburð
- at hava framtakssinni
- at standa ímóti trýsti.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Berg í Garði, postverksstjóra.

Umsóknir skulu verða postverkinum í hendi í seinasta lagi hin 23. februar 2001 og skulu sendast til Postverk Føroya, Postverksstjórin, Postsmoga 3009, 110 Tórshavn

Um stovnin: Postverk Føroya er stovnur undir Vinnumálastýrinum. Virkisuppgávan hjá stovninum er at veita føroya fólki eina dygdargóða posttænastu. Postverkið er eitt av landsins størstu arbeiðsplássum. Á stovninum starvast um 300 fólk. Í Norðoya postøki



Vit gera alt
URTAGARÐSARBEIÐI
• Grasvøllir • Planting • Viðlíkahald
• Seta gravsteinar upp v.m.
• Gera tún við flisum ella oljugrúsi
• Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.

Spyr - tað kostar einki!

Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta

**Fa. SÍMUN DALSGAARD**
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 28 21 00 • Fax 32 04 78